# Smærru skúlarnir fara helst í søguna

*Skúlabørnini í Sandvík hava rokning fyrrapartin í gjár. Men spurningurin er kanska, hvussu leingi tey sleppa at ganga í bygdarskúlanum í heimbygdini – hesi børnini: Mary, 1. flokkur; Brynhild, 2. flokkur; Tórur, 3. flokkur; Eyðfinnur 3. flokkur og Herálvur 5. flokkur. Sætti næminurin, Olgar, var ikki í skúla í gjár. Lærari er Nita Næs.*
*Mynd: Áki Bertholdsen*



**Fleiri av smærru skúlunum í Suðuroy hava ongan 1. flokk í ár. Teirra millum er skúlin á Leiti, har als eingin skúlagongd er í ár. Sannlíkt er, at hesin skúlin hevur hýst seinastu næmingum sínum. Spurningurin í dag er helst, hvør bygdarskúli verður tann næsti í røðini**

BYGDARSKÚLAR
*Snorri Brend*

**Leiti:** - Er tann afturlætni skúlin á Leiti eitt fordømi fyri aðrar skúlar í oynni?!

Henda spurningin seta mong fólk í Suðuroynni sær, nú skúlagongdin á Leiti er steðgað í ár – og helst eisini í framtíðini.

Farna skúlaárið gekk eitt einstakt barn í hesum skúlanum, og hevði rætt til eitt ár aftrat her. Men Sumbiar kommuna tók hinvegin stig til, at hesin næmingurin varð sendur til skúlan í Vági.

Við hesum læt skúlin aftur, og tað eru ikki øll eins fegin um. Tey óttast nevniliga fyri, at hetta dømið av Leiti kann verða fylgt við aðrar av smærru skúlunum í oynni.

Sum støðan er beint nú, eru nøkur fá børn undir skúlaaldur í Lopra og Økrum. Men sannlíkindini fyri at tey fara í skúlan á Leiti eru rættiliga avmarkað.

Tey fara helst í skúlan í Vági, tá tann tíðin kemur.

### Uttan næmingar

Tað vísir seg nevniliga, at talið av næmingum er fallandi í teimum smærru skúlunum í oynni.

Hagtølini frá Mentamálaráðnum fyri skúlarnar í Suðuroynni hetta skúlaárið vísa greitt á hesa somu gongdina:

Í Sumbiar skúla fóru tvey børn í 1. flokk í ár, meðan einki barn gongur í 2. flokki og í 5. flokki.

Í Porkeri fór bert eittans barnið í 1. flokk. Hetta sama gjørdi seg galdandi í Sandvík, har heldur einki barn er í 4. flokki.

Hinvegin so fór einki barn í 1. flokk í Fámjin, har heldur einki barn er í 3. flokki. Nevnast kann, at hagtølini vísa, at av teimum 10 næmingunum í Fánjin ganga seks teirra í 4. flokki.

Sama støðan er í Hovi, har einki barn fór í 1. flokk, og har heldur einki barn er í 3. flokki og í 7. flokki.

### Steingja for ever

Tað er kortini ikki allastaðni í Suðuroynni at talið av skúlabørnum minkar.

Á Tvøroyri eru hinvegin fleiri børn í 1. flokki í ár enn í 2. flokki. Her fóru 33 børn í skúla í ár, móti teimum 28, sum nú eru í 2. flokki.

Men í Vági er talan um eina minking í ár. Hesaferð fóru bert 19 børn í skúla á fyrsta sinni, meðan 26 næmingar eru í 2. flokki. Sigast skal tó, at talið í ár samsvarar meiri við talið á næmingum í 2. og 3. flokkunum í skúlanum, har ávikavist 18 og 19 næmingar ganga.

Kortini so eru tað mong sum eru farin at hugsa um smærru bygdarskúlarnar og framtíð teirra.

Tey óttast nevniliga fyri, at tær smærru kommunurnar so líðandi fara at flyta næmingarnar á teir størru skúlarnar.

Á henda hátt tekur ein samstundis grundarlagið undan teimum smærru bygdarskúlunum.

# Bert smærri bilar inn í bygdina



*Onkutíð kunnu nógvir persónbilar standa parkeraðir inni í Tjørnuvík. Tað fáa teir framvegis loyvi til, men teir størru bilarnir mugu í framtíðini parkerast uttanfyri bygdina*

**Tað kann loysa seg at heita á eina kommunu at bøta um ferðsluviðurskiftini í eini bygd. Tað prógvaðu tvær kvinnur, sum ynsktu tryggari ferðslu inni í Tjørnuvík**

FERÐSLA
*Snorri Brend*

**Tjørnuvík:** Nú verður ikki longur loyvt bilførarum at seta størri bilar frá sær inni í Tjørnuvík.

Hetta samtykti bygdaráðið í Sunda kommunu mánakvøldið, tá eitt uppskot um ferðsluviðurskiftini í hesi vøkru bygdini var til umrøðu.

Hetta uppskotið gekk út uppá at forbjóða bilum, sum eru størri enn 3,5 tons at parkera á almennum vegi inni í bygdini.

Hinvegin so var eisini eitt annað uppskot í somu atløgu til viðgerð, har setast skuldu upp vegforðingar í bygdini.

Hetta málið varð ikki samtykt tá, men skal nú kannast víðari.

### Vegforðing

Spurningurin um ferðsluviðurskiftini í Tjørnuvík gjørdist aftur aktuellur, eftir at tvær kvinnur høvdu heitt á kommununa um at gera nakað við hetta.

Hesar báðar kvinnurnar - Randi við Brúgv og Sólrun Magnussen – heittu nevniliga á Sunda kommunu um at bøta um ferðsluna inni í bygdini.

Í fyrstu atløgu skutu hesar kvinnur upp, at gera eina vegforðing um brúnna um Stórá.

Í øðrum lagi skutu tær upp at forboð varð sett størri akførum at parkera inni í bygdini.

### Stórur ampi

Hesar báðar kvinnurnar grundgóvu eisini fyri hesi áheitanini: Eftir teirra sannføring var tað til stóran ampa, at bilarnir koyrdu ov skjótt inni í bygdini.

Tær vístu eisini á, at tá talan er um parkering av størri akførum so er bygdin alt ov trong til hesi.

- Hetta átti eisini at verið óneyðugt, tí eitt parkeringspláss til stórar bilar er, áðrenn ein kemur til bygdina, søgdu tær í áheitanini á kommununa.

Tekniska nevndin í Sunda kommuna tók við vælvild móti hesi áheitanini, og mælti tekniska nevndin til, at bygdaráðið eisini gjørdi tað sama.

Á fundinum mánakvøldið samtykti bygdaráðið at forboð verður sett størri bilum at parkera á almennum vegi inni í bygdini.

Tá talan varð um vegforðingina við brúnna um Stórá, so ynskti bygdaráðið at málið verður latið aftur til teknisku nevndina til víðari arbeiði.